FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

SKEIÐ Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA 2008-2009

# Próvskeið í enskum

a) Skeið til Cambridge First Certificate in English byrjar í Jónas Broncks gøtu 25 23. oktober í einum flokki við undirvísing hósdag kl. 13.00-16.00.

- Fortreytir: 10. floks støði ella samsvarandi kunnleiki, ávísur førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

b) Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English byrjar í Ovastovu í Nóatúni 22. oktober í einum flokki við un¬dirvísing mikudag kl. 9.00-12.00.

- Fortreytir: Staðið "Advanced English", málsligt students-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

Próvtøkurnar verða í mai/juni 2009.

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. Tilmeldingarfreistin er sett til 03. oktober 2008. Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

**Tilmeldingargjaldið er 1.000 kr.**

Fyri próvtøku í First Certificate in English gjalda næmingar 900 kr. og fyri próvtøku í Certificate of Proficiency in English 1.100 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

# Jørð til sølu

16 gyllin og 10 skinn – fyri UTTAN – á Skarði til sølu um nøktandi boð fæst.

**Skriva til Sosialin, Postboks 76, 110 Tórshavn**
**Bill. mrk. 180-01**

# Sosialurin

www.sosialurin.fo

ÚTLENDINGASTOVAN

# Útlendingastovan í nýggjum hølum

Útlendingastovan letur upp í nýggjum hølum mikudagin 24. september 2008, kl. 09.00, í Niels Finsensgøtu 10, 3. hædd., Tórshavn.

Opið er mánadag til fríggjadag frá kl. 09.00 til kl. 15.00.

Í sambandi við flytingina er Útlendingastovan stongd mánadagin 22. september og týsdagin 23. september 2008.

**Útlendingastovan · Niels Finsensgøta 10 · 3. hædd**
**FO-100 Tórshavn · Telefon: 357979**

# Lær at dansa

## Rock´n roll

**Byrjunarskeið verður í fimleikahøllini á Føroya Læraraskúla**

**fríggjakvøldið 26. sept. kl. 19.00 – 21.00 og**
**leygardagin 27. sept. kl. 14.00 – 16.00**

**Øll eru vælkomin**
(støk / pør, ung og eldri)

**Tilmelding hjá Marilyn**
**á tlf. 26 38 45**



***Kom og Dansa***



# Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**

# HÚS Í MÝRINUM TIL SØLU

Um nóg høgt boð fæst er sethús á matr. nr. 490b í Vági til sølu. Húsini eru innrættaði í 2 hæddum, hvør hæddin ca. 60 m² + hjallur, sum er 17 m². Húsini eru ný ístandgjørd.

**Áhugað kunnu ringja 373437 ella 573437**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Starvslýsing:

# Laborantur til Náttúruvísindadeildina

Søkt verður eftir laboranti til starvsstovuna á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Starvið er ¾-tíðar vikarstarv í tíðarskeiðnum frá 1. november 2008 til 30. september 2009.

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar eru:
- Starvsstovuarbeiðið, so sum:
  - kemiskar, fysiskar og mikrobiologiskar analysur
  - framleiðslu av reagensum
- Viðlíkahald av starvsstovutólum
- Heintan av sýnum til kanningar
- Faklig vegleiðing av studentum

**Førleiki**
Vit vænta at tú:
- ert laborantur ella laboratoriuteknikari við starvsroyndum
- ert opin fyri førleikamenning
- hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt og ert røkin
- hevur kunnleika til vanlig telduforrit, t.d. Microsoft Office.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett frá 1. november 2008 ella skjótast gjørligt. Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, fl. IV.

**Meir at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hórald Joensen á tel. 35 25 00 ella á teldupostadressuni horaldurj@setur.fo.

**Umsóknir og umsóknarfreist**
Umsóknir við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast til Náttúruvísindadeildina, Nóatún 3, Postrúm 2109, FO 165 Argir. Umsóknarfreistin er fríggjadagin 26. september 2008.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

# Frá Sláturmiðstøðini í Haraldssundi

Nú er flettingartíð. Um tú ikki hevur tíð og orku, so fletta vit fyri teg og vit hava eisini neyðuga flutningsbilin.

Skjótt og væl úr hondum greitt.

Eisini selja vit fesk og røst krov.

**Ring: 21 67 47 ella 28 67 87.**

**Sláturmiðstøðin**
***...altíð ein tumma frammanfyri***

FJØRUVEGUR 1 · 785 HARALDSSUND